# Vistfrøði í Føroyum - bólkaarbeiði

Landbúnaðurin í Føroyum hevur frá fyrndini mest verið seyðahald, kornvelting og seinni eplavelting.

So hvørt sum landbúnaður í størri og størri mun gerst vinna, verða krøvini til peningaligan vinning størri. Í dag, er einasti parturin av landbúnaðinum í Føroyum, sum veruliga er vinnuligur, mjólkaframleiðslan. Seyðahald er einans vinnuligt saman við aðrari framleiðslu og ferðavinnu.

Ongin føroysk vistfrøðilig góðkenning av matvøruframleiðslu er í Føroyum.

Tit skulu gera eina greining av niðanfyristandandi vinnum/matvøruframleiðslum í Føroyum og meta um møguleikarnar fyri at fáa vistfrøðiliga góðkenning.

1. Mjólkaframleiðsla
2. Vinnuligt seyðahald
3. Grønmetisframleiðsla
4. Ber og frukt
5. Ferðavinna/húsdýr og landbúnaður

1. Greið frá hesum vinnum í dag
2. Lýs munin á vistfrøðiligum og konventionellum landbúnaði sum heild
3. Viðgerð tykkara evni við støði í tíðindastubbum (tit kunnu leita á tíðindaportalum og tidarrit.fo). Og hagtølum um tey eru til.
4. Met um møguleikarnar og gagnið av at gera framleiðsluna vistfrøðiliga
5. Fyrireikið eina framløgu !